Allar stjørnurnar eru við

Jugoslaviski landsliðshópurin móti Føroyum telur sum vant hópatals stjørnur

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Eins og Allan Simonsen hevur gjørt tað, so hevur jugoslaviski starvsfelagið hansara, Dejan Savisevic, kunngjørt hópin, sum hann hevur valt sær til komandi landsliðsuppgávuna.

Teir báðir landsliðsvenjararnir hava annars tað til felags, at teir báðir eiga eina fortíð millum mætastu fótbóltsfeløgini í Europa, men annars er tað ikki tað heilt stóra, sum teir hava í felag.

Burtur sæð frá teirri sannroynt, at báðir hava talst millum bestu leikarar í Europa, hava Allan Simonsen og Dejan Savicevic ikki tað stóra til felags

Munur er á

Meðan Allan Simnosen við einum tveimum undantøkum noyðist at finna sær leikarar í føroyskum fótbólti og sekunderum útlendskum deildum, so eru tað í flestum førum stórfeløg runt í Europa, sum lata leikarar til jugoslaviska liðið.

Hópruin telur eina rúgvu av navnframum leikarum, sum í nógvum førum hava roynt at veri meistarar í nøkrum av sterkastu europeisku deildunum, eins og nakrir teirra eisini hava roynt seg á sigurspallinum, tá finaludystir hava verið leiktir í europeisku steypakappingunum fyri lið.

Tí er kanska ikki annað væntandi, enn at føroyska liðið fer at koma sær í eitt satt óløgi, tá farið verður á vøllin í Beograd, men hinvegin hevur føroyska liðið áður prógvað, at teir væl eru førir fyri at skapa eitt heiðurligt úrslit – eisini tá tikist verður við nakrar av bestu leikarunum í okkara heimsparti.

Hópurin

Sum sagt, so hevur Savicevic gjørt, hvørjir leikarar skulu manna hópin, og verða teir nevndir niðanfyri. Í klombrum er viðmerkt, hvørjum felag leikararnir spæla við í gerandisdegnum.

Málverjar eru I. Kralj úr PSV Eindhoven og R. Radakovic úr Partizan. Verjuleikarar eru Z. Mirkovic (Fenerbache), M. Obradovic (Lokomotiv Moskva), M. Dukic (Valencia), G. Dorovic (Deportivo), S. Mihajlovic (Lazio), D. Ognjanovic (Partizan), B. Dmitrovic (Grazer AK) og Gvozdenovic (Crvena Zvezda). Miðvallarar eru I. Tomic (Roma), D. Stankovic (Lazio), L. Drulovic (Benfica), P. Dordjevic (Olympiakos), S. Ilic (Partizan), N. Lazetic (Fenerbache) og R. Krivokapic (Vojvodina). Áleyparar eru S. Milosevic (Parma), P. Mijatovic (Fiorentina), M. Kezman (PSV Eindhoven), D. Kovacevic (Juventus) og M. Pjanovic (Crvena Zvezda).

NSÍ-LÍF 1-3 (1-0):

Runavíkingar mistu

Leirvíkingar tóku eitt týdningarmikið fet í botninum, tá teir sunnudagin skumpaðu NSÍ niðureftir á stigatalvuni

2. DEILD
Jákup Mørk

Runavíkingar hava í ár havt eitt hampuliga gott tak á oddinum í aðru deild. Úrtøkan hjá næstbesta liðnum hevur verið somikið støðugt, at teir við einum sigri á einum av hinum eysturoyarliðunum., LÍF, av álvara kundu nærkast topp-inum.

Fyrra hálvleik gekk eisini á leið soleiðis, sum tað skuldi. Runavíkingar løgdu seg á odda við einum máli frá roynda Sverra Justinussen, og sjálvsáltið mundi tí eisini vera í lagið, tá farið varð til hálvleiks.

Í seinna hálvleiki tóku leirvíkingar tó fullkomuliga heimaliðið á bóli. Tomek Resel javnaði, áðrenn Mirek Gill syrgdu fyri leiðsluni, og meðan NSÍ nú royndi at koma aftur í aftur, slerdi Kristian Eliasen sigurin hjá leirvíkingum fastan.

Hóast NSÍ soleiðis innan trý korter misti takið í oddaliðunum, og hóast teir helst høvdu vónað eitt betri úrslit, so man árið á ongan hátt verða mett sum miseydnað. Liðið hevur mest sum tryggjað sær framhaldandi livitíð í deildini, og ivaleyst mundi hetta eisini vera málið, sum sett várð, tá farið varð undir venjingina.

Í Leirvík er hinvegin enn illa statt. Gaman í lyftu tær sær við sigrinum upp um klaksvíkingar, munurin niður til gøtumenn minkaði tó einki, tá hesir eisini vunnu sín dyst.

Leirvíkingar høvdu sína bestu tíð í 80'unum, tá teir eitt langt skifti hildu fast um plássið í bestu deildini, men síðani hevur gingið afturá. Í nøkur ár vóru teir við til at mynda oddin í næstbestu deildini, men í seinastuni hevur talan mest verið um eina roynd at yvirliva, og skal hetta aftur eydnast í ár, skulu enn fleiri stig setast inn á kontina.

NSÍ-LÍF 1-3 (1-0)

1-0: Sverri Justinussen
1-1: Tomek Resel
1-2: Mirek Gill
1-3: Kristian Eliasen

ÍF-Sumba 7-2

Ferð er á ÍF

Fuglfirðingar tykjast endiliga at hava sett kós móti bestu deildini

2. DEILD
Jákup Mørk

Eftir at teir fingu eina byrjan, sum má sigast at vera væl undir tí, sum roknað varð við, tykjast fuglfirðingar loksins hava rætta skútuna, soleiðis at hon nú stevnir móti bestu deildini.

Sunnudagin komu sumbingar á vitjan, og flest øll mundu rokna við, at hesin dysturin fór at geva eina greiða ábending um, hvørt fuglfirðingar veruliga hava góðskuna til at vinna seg upp aftur í fremstu rað, har teir sjálvir halda seg hoyra heima.

Hildu ferðini

Skal metast eftir dystinum sunnudagin, so er eingin ivi. Fuglfirðingar vóru snøgt sagt nógv betri enn sumbingar, og úrslitið gjørdist so eisini ein ruddiligur sigur til vertirnar.

Í fyrra hálvleiki var kanska ikki tann stóri munurin á liðunum. Heldur ikki í málum, tí bert eitt av teimum níggju málunum kom í fyrra hálvleiki.

Í seinna hálvleiki tóktist tó skjótt greitt, at tað vóru fuglfirðingar, sum høvdu betri orku at spæla. Teir royndu at halda leikferðina á sama støði, sum hon hevði verið fyrra umfarið, og so hvørt sum sumbingarnir gjørdust alsamt moyrari, fingu teir á heimaliðnum betri og betri pláss at dusa sær á.

Teir skutu seg upp á 3-0, áðrenn sumbingar svaraðu aftur, men tá var allur spenningur langt síðani farin úr dystinum. Heldur tóktist spurningurin vera, hvussu stórur sigurin hjá ÍF skuldi gerast. Teir støðgaðu við sjey, so støðan hjá sumbingum at enda mest var átøk einum vánaligum sjavsi. Teir fingu tvey fyri sjey!

Hjá ÍF skeyt Høgni á Lakjuni trý mál, meðan Nebojsa Velkovic og Sasja skutu málini hjá Sumba.

Sær ljóst út

Við sigrinum tykist ÍF veruliga at hava sett seg í fararasetrið, tá talan er um uppflytan til bestu deildina. Á stigatalvuni er bert HB framman fyri ÍF, men havnarliðið kann ikki flyta upp, so heldur verandi støðan sær, verður tað ÍF, sum fær beinleiðis atgongumerkini.

Harafturat tykjast fuglfirðingar eftir eina trilvandi byrjan at hava fingið veruliga ferð á spælið. Sigrarnir seinastu tíðina hava verið sera sannførandi, og tá munurin niður til næsta uppflytingarkandidatin, TB, er trý stig, hevur ÍF eisini ráð til at snáva onkustaðni á vegnum.

Kappingarárið hevur tó víst, at støðan í deildini kann vera sera skiftandi, og tí eiga fuglfirðingar ikki at kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur, men tað skerst tó ikki burtur, at tað veruliga sær ljóst út í løtuni.

Skúlin í Hoyvík

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv til skúlaárið 2001/02.

Starvið er 23 tímar um vikuna.

Umsóknir, stílaðar til Skúlastýrið fyri Skúlan í Hoyvík, skulu sendast skúlanum í seinasta lagi mánadagin 20. august 2001.

Skúlastýrið fyri Skúlan í Hoyvík

Sky digital og Orbit Network.

Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.

Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.

Sjálvandi tann tryggasta loysnin.

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf 421411 ella 215328

Fígging kann útvegast

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Skjót levering

Danstein
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
www.danstein.fo Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2387, Sp/f Opportuna, 100 Tórshavn.

Navn: Sp/f Opportuna
Adressa: 100 Tórshavn
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 1062, P/F Formula.fo.

Skráseting Føroya tann 10. august 2001

Kristin Balle

Tilhaldið í Tórsgøtu 21

Dagar í viku
20. august til 24. august 2001
Øll gomul eru hjartaliga vælkomin.

Vælkomin
20. aug. kl. 10 — **Jákup Lindenskov**, formaður í nevndini í Tilhaldinum

Fyrilestur (alm.)
20. aug. kl. 14 — **Arbeiðsdagurin lokin**, Elin Mortensen

Heðin Brú — **Hanus A. Samuelsen**, Tilm. tlf. 316491
20. aug. kl. 10-12 — Heðin Brú og skaldskapur hansara (fyrilestur og prát)
kl. 15-17 — Framhald, serliga um skaldsøgurnar
kl. 15-17 — Bólkaarbeiði og framløga
27. aug. kl. ? — Útferð í Sandoynna (tilm.)

Teldudagar
20.-24. august kl. 15-17 — **Ásmundur V. Jóhannesen**, Tilmelding tlf. 316491

Prát og frásøgn
20.-24. august kl. 10-17 — **Marianna D. Dahl**, Tilmelding tlf. 316491

Arbeiðsverkstaður
20-24. august kl. 10-17 — Pappírklipp, seyming og annað handverk í kjallaranum. Tilmelding tlf. 316491

Likamsrørsla o.a. — **Jórun Simonsen og Marian Dam**, tilm. 316491
20.-24. august

Fyrilestur (alm.)
23. aug. kl. 15 — **Sálarligar broytingar í aldurdóminum.** Sofus Joensen, sálarfrøðingur.

Møguleiki er at keypa døgurða allar dagarnar (tilmelding tlf. 316491). Somuleiðis drekkamunnur við heimabakaðum.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Hús í Klaksvík til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður ognin Vágsheygagøta 31 seld.

Húsini standa sera væl fyri, beint við miðbýin.

Snotuligt umhvørvi við urtagarði.

Áhugaði kunnu venda sær til

tlf. 455994

KVØLDSKRÁ

Á HANDILSSKÚLANUM Á KAMBSDALI

Innskrivingarseðil, heysthálvan 2001

Navn:	
Føðingardagur:	
Gøta:	
Postnr./bygd:	
Starv/arbeiðsplass:	
Tel. heima:	**Tel arb.:**
Teldupost adr.:	

HH-stakroynd: (setið x)
Virkisbúskapur B-stig — Týsd. 16.00-18.30 ☐

Prøvtøka í mars/apríl 2002

Merkonom:
Starvsfólkafyrisiting* — Mánad. 18.00-20.30 ☐
Búskaparstýring** — Týsd. 18.00-20.30 ☐
Virkisbúskapur* — Mikud. 18.00-20.30 ☐
* 45 tíma lærugrein. Prøvtøka í desember 2001.
** 90 tíma lærugrein. Prøvtøka í mai 2002.

Kostnaður:
Depositum: 250,00 kr. fyri hvønn luttakara
Stakroynd, luttøkugjald: 300,00 kr. fyri hvørja stakroynd
Merkonom, luttøkugjald: 400,00 kr. fyri 45 tíma lærugrein
600,00 kr. fyri 90 tíma lærugrein

Serligar fortreytir:
Í nøkrum merkonomlærugreinum eru umframt vanligu fortreytirnar eisini serligar fortreytir galdandi:
- Í Búskaparstýring krevst, at tú hevur verið innskrivaður til undirvísing og verið til prøvtøku í Greining og fígging, Virkisbúskapi og Ársroknskapi.
- Í Virkisbúskapi krevst kunnleiki til roknskap svarandi til 30 tíma undirvísing.

Dagur, undirskrift

Ivast tú, ring og spyr eftir lestrarvegleiðara. Fleiri upplýsingar um merkonomútbúgvingina eru at finna undir útbúgvingar á www.hsh.fo.

Innskrivingarfreistin til kvøldskúlan er **17. august. 2001**. Skúlagongdin byrjar í viku 35. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum. Øll undirvísing er treytað av nóg góðari undirtøku.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Kambsdalur - 530 Fuglafjørður
Tel. 444 900 - Fax 444 901 - Teldupost adr: fh@kambsdal.olivant.fo

FARTELEFONIR

GSM - NMT 450

Tráðleysar telefonir o. a.

Ymisk merki, so sum:

MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA CONNECTING PEOPLE
SIEMENS
BENEFON

SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045